# Vegleiðing
# um
# avrikssáttmála
# og
# stjórasáttmála

Apríl í 2006

**1. INNGANGUR TIL AVRIKS- OG STJÓRASÁTTMÁLA ........ 1**

**2. VEGLEIÐING TIL AVRIKSSÁTTMÁLA ........ 3**

2.1 MISSIÓN, VISJÓN OG STRATEGI ........ 3
2.2 UPPGÁVUSTIGVELDISSKIPAN ........ 3
2.3 TILMÆLI TIL MÁL OG AVRIKSKRØV ........ 6
2.4 TILGONGD TIL AVRIKSSÁTTMÁLA ........ 9

**3. VEGLEIÐING TIL STJÓRASÁTTMÁLA ........ 11**

**4. GERA AVRIKS- OG STJÓRASÁTTMÁLA ........ 13**

**FYLGISKJAL 1: FORMUR TIL AVRIKSSÁTTMÁLA ........ 14**

**FYLGISKJAL 2: FORMUR TIL STJÓRASÁTTMÁLA ........ 17**

# 1. Inngangur til avriks- og stjórasáttmála

Landsstýrið er seinastu árini farið at nýta munadygga fíggjarstýring. Grundarlag er tí fyri at taka nýggj stig fram ímóti miðvíst at stýra almenna virkseminum, so fyrisitingin verður munadyggari. Ætlanin er at seta í verk mál- og avriksstýring fyri tað almenna eftir nøkulunda somu meginreglum sum í hinum Norðurlondunum.

Einstaka stjórnarráðið skal saman við stovninum seta yvirskipað mál fyri tey ábyrgdarøki, sum stovnurin er settur at røkja. Yvirskipaðu málini kunnu verða greinað sundur í lutmál, sum áseta, hvørji úrslit skulu verða avrikað, fyri at yvirskipaða málið skal verða rokkið. Undir einum verður tað nevnt mál- og avriksstýring.

Amboð, sum verður brúkt í hesum sambandi, er avrikssáttmáli. Hann er skrivlig avtala millum stjórnarráð og stovn um, hvørji mál og úrslit skulu verða rokkin í einum fíggjarári. Stjórasáttmáli er ískoyti til avrikssáttmála. Har er ásett, at stjórin skal hava ávísa lønarviðbót, alt eftir hvussu væl tað hilnast at røkka málunum.

Grundarlagið undir at seta í verk avriks- og stjórasáttmálar er § 5 í nýggju roknskaparkunngerðini, ið m.a. ásetur, at allir stovnar skulu seta mál og seta krøv til avrik innan fyri tøk tilfeingi og innan fyri yvirskipaðum málum, sum hægri myndugleiki hevur sett.

Endamálið við mál- og avriksstýring er at fáa sum mest burtur úr landsins búskapartilfeingi og samstundis tryggja, at samsvar er millum politisku ætlanirnar og uppgávurnar, sum stovnurin skal loysa.

Fleiri grundgevingar tala fyri at brúka sáttmálastýring:

- Avrikssáttmálar skapa fyritreytir fyri, at alment virksemi verður rikið munadygt. Millum leiðslu og starvsfólk gevur tað felags fatan av, hvussu málini og avrikini kunnu verða rokkin. Eisini birtir sáttmálin uppundir, at meiri áherðsla verður løgd á tær uppgávur, sum skulu verða loystar.

- Avrikssáttmálar eru ein fyritreyt fyri, at tað, sum raðfest verður, sæst, og at tað legnar seg eftir teimum ætlanum, sum stjórnarráðið hevur. Royndir vísa, at avrikssáttmálar eru gott amboð at samskipa og styrkja samskiftið millum stovn og stjórnarráð.

- Avrikssáttmálar eru gott amboð hjá stjóra á stovni at fáa til vega betri upplýsingar um, hvussu uppgávurnar verða loystar, og eftir tí meta um framleidni og munadyggsemi á stovninum.

Tá mál og avrikskrøv skulu verða sett, verður tað gjørt í samskifti millum stjórnarráð og stovn. Tað er so statt ikki stovnurin einsamallur, ella fyri mesta partin, sum ásetur, hvørji mál og avrikskrøv skulu verða í avriks- og stjórasáttmálanum.

Avriks- og stjórasáttmálar eru ikki sáttmálar í vanligum løgfrøðiligum samanhangi. Avrikssáttmálin broytir ikki ábyrgdina hjá landsstýrismanninum og tær vanligu fyriskipanarreglurnar millum stjórnarráð og stovn. Heldur ikki broytir stjórasáttmálin setanarviðurskiftini. Talan er heldur um sáttmálalík stýringsviðurskifti.

Endamálið við stjórasáttmála er, á sama hátt sum við avrikssáttmála, at avrikini hjá stovnum verða sett meiri í miðdepilin. Hetta sáttmálasnið gevur eisini betri samsvar millum rokkin mál og avrik og partar av stjóralønini.

At fyrisitingarligar mannagongdir verða broyttar, merkir ofta stakmeirkostnað. Tað er eisini galdandi fyri avriks- og stjórasáttmálar. Serliga fyrstu ferð, sáttmálar verða gjørdir, má væntast, at nógv orka og tíð fer til arbeiðið.

Á sama hátt sum fíggjarlógin er alment atkomulig, verður mælt til, at avriks- og stjórasáttmálar og ársfrágreiðingar, har gjørt er upp, hvussu hilnast hevur við settum málum og avrikskrøvum, verða alment atkomulig. Mælt verður til t.d. at leggja tær á heimasíðuni hjá stjórnarráði og stovni.

Í hesi vegleiðing verður viðgjørt, hvussu stjórnarráð og stovnar kunnu gera avriks- og stjórasáttmálar. Komið verður við tilmælum um ymisk viðurskifti, ið stjórnarráð og stovnar eiga at taka støðu til, áðrenn farið verður undir at gera avriks- og stjórasáttmála. Viðgjørt verður eisini, hvussu tilgongdin hjá stovni til sáttmála kann verða, umframt tíðarætlan og arbeiðshátt millum stjórnarráð og stovn. Í fylgiskjali 1 og 2 eru formar til ávikavist avrikssáttmála og stjórasáttmála.

Meginhugtøk

Mál merkir tað, sum vit skulu røkka. Mál kunnu verða vend úteftir og snúgva seg tá um tænastur, veitingar og framleiðslur til borgarar/brúkarar. Dømi kann vera, at brúkaranøgdsemi á stovni X skal verða 10% betri í 2007 enn í 2006. Mál kunnu eisini verða vend inneftir og snúgva seg tá um, hvussu stovnurin loysir uppgávurnar innanhýsis. Dømi kann vera, at innan 2007 skulu xx starvsfólk hava staðið teldukoyrikort.

Eitt avrikskrav er eyðkenni fyri, hvat ein stovnur skal røkka innan ásetta tíðarfreist og borið saman við sett mál. Tað kunnu verða fleiri avrik, sum skulu verða rokkin, áðrenn málið er endaliga rokkið, t.e. eitt mál kann verða lagað sundur í fleiri avrik. Brúka vit dømi um, at málið er 10% meiri nøgdsemi, kunnu avrikini vera, at borgarar, sum vilja hava tænastu Y, skulu hava hana innan 4 arbeiðsdagar, og ikki fleiri enn 2% av borgarum klaga um tænastuna o.s.fr.

# 2. Vegleiðing til avrikssáttmála

Skal tilgongdin til avrikssáttmálar vera skipað, er ymist fyrireikingararbeiði, sum stjórnarráð og serliga stovnar eiga at gera, áðrenn sjálvur sáttmálin verður gjørdur. Fyrst av øllum eiga stovnar at gera eina missión, visjón og strategi fyri virksemi sínum. Í tí arbeiðinum kann tað vera skilagott at flokka uppgávurnar í eina uppgávustigveldisskipan (uppgávuhierarki), ið kann vera ein góð hjálp til at seta "røtt" mál og avrikskrøv.

Niðanfyri verður greitt gjøllari frá hesum undir yvirskriftum:

1. Missión, visjón og strategi
2. Uppgávustigveldisskipan
3. Tilmæli til mál og avrikskrøv
4. Tilgongd til avrikssáttmálar

## 2.1 Missión, visjón og strategi

Missión og visjón eru vanliga stuttorðaðar. Ein missión er ein yvirskipað orðing, sum ásetur tilverugrundarlagið hjá stovninum. Ein visjón ásetur meira ítøkiliga, hvat stovnurin skal gera fyri at røkka missiónina. Við øðrum orðum kann eisini verða sagt, at missiónin setur spurningin "hví eru vit her?", og visjónin setur spurningin "hvagar skulu vit fara í framtíðini?".

Missiónin er hægsta stigið í uppgávustigveldisskipanini (sí gjøllari niðanfyri), og er ein áseting av teimum yvirskipaðu málum, sum stovnurin ætlar sær at røkka. Missión og visjón eru amboð at greina og raðfesta uppgávurnar hjá stovninum.

Fyri skipað at seta mál og avrikskrøv, er strategisk ætlan fyri stovnin fyri næsta og komandi árini stór hjálp. Tíðarkarmurin fyri strategisku ætlanina má verða lagaður til virksemi stovnsins og settur út frá teimum karmum, sum stjórnarráðið hevur sett.

Í avrikssáttmálanum eiga missiónin og visjónin at verða endurgivin. Somuleiðis eiga týdningarmestu strategisku miðdepilssøkini at verða lýst og raðfest. Tað ger greiðari, hvussu stovnurin raðfestir uppgávurnar, og hvussu mál og avrikskrøv verða sett samanborið við uppgávurnar.

## 2.2 Uppgávustigveldisskipan

Uppgávustigveldisskipanin er eitt amboð í mál- og avriksstýring. Endamálið við uppgávustigveldisskipanini er at vísa, hvussu uppgávurnar hjá stovni eru settar saman, og hvat skal til, fyri at tær kunnu vera so framleidnar og munadyggar sum til ber. Niðanfyri er víst, hvussu uppgávustigveldisskipanin er skipað.




Tá ið mál verða sett, eiga tey at vera so ovarlaga í stigveldisskipanini sum til ber, helst á árinar- ella úrdráttarstigi (produktniveau). Tað er vanligari, at avrikskrøv eru á veitingar- ella virksemisstigi.

Niðanfyri er greitt frá samanhanginum í uppgávustigveldisskipanini, og tað er eisini lýst við einum dømi.

Fíggjarevni er tann peningur, sum stovnurin hevur at ráða yvir, t.d. játtan á fíggjarlógini, avgjøld ella aðrar inntøkur. Peningurin verður brúktur at gjalda tilfeingið fyri.

Tilfeingi er sum meginregla øll starvsfólk á stovninum, undirveitarar, bygningar, útgerð og annað, viðurskifti, ið eru neyðugt at fremja virksemið.

Virksemi er framleiðslutilgongdin á stovninum. Tað er á virksemisstigi, at uppgávurnar verða framdar. Uppgávurnar kunnu vera ráðlegging, saksviðgerð og journalisering. Virksemi kunnu verða flokkað eftir innihaldi, alt eftir hvørjar veitingar tey stuðla undir.

Veitingar eru t.d. útgjaldingar til ávísan stuðul ella avgerðir í einum máli. Veitingar kunnu so aftur verða flokkaðar í úrdráttir.

Úrdráttur er tað, sum stovnurin letur borgaranum ella brúkaranum, t.d. fólkapensjón ella bileftirlit. Tað er á úrdráttarstigi, at tað, sum stovnurin ger, er sjónligast. Tað er eisini á úrdráttarstigi, at best kann vera mett um framleidni og avrik hjá stovnunum. Tí verður mælt til, at málini í avrikssáttmálanum verða sett eftir úrdráttunum.

Endamálið við úrtøkuni er árinini, tey hava á borgaran ella samfelagið. Tað kunnu verða nógv ymisk viðurskifti, ið kunnu ávirka árinini, og tí er hetta økið ofta trupult at máta. Dømi um árin kunnu vera rættartrygd fyri borgaran ella burðardygg fiskivinna.

Alt eftir, hvussu uppgávustigveldisskipanin á stovnum er bygd upp, eru ofta fleiri møguleikar, hvussu uppgávurnar kunnu verða flokkaðar og greinaðar. Eingin

objektivur rættur máti er. Neyðugt er at greina uppgávurnar[1], sum stovninum skal loysa.

Uppgávustigveldisskipanina kann stovnurin fram um alt grunda á tað tilfari, sum longu er á stovninum. Dømi kunnu vera:

- Høvuðsendamálini fyri stovnin, sum eru í viðmerkingunum í fíggjarlógini
- Endamál og uppgávur, sum eru ásettar í lóg ella øðrum reglum
- Strategiir ella ætlanir fyri stovnin, um tær eru
- Arbeiðslýsingar fyri deildir ella starvsfólk á stovninum

Arbeiðið at gera eina uppgávustigveldisskipan er gott grundarlag at gera avrikssáttmálar, og at fáa sett tey "røttu" málini og avrikskrøvini. Eisini kann uppgávustigveldisskipanin verða brúkt, tá ið missión, visjón og strategi skulu verða gjørdar fyri stovnin.

Niðanfyri er víst eitt dømi um uppgávustigveldisskipan hjá gjaldstovuni.




Ein av úrdráttunum hjá Føroya Gjaldstovu er "pappírsleyst roknskaparverk" fyri allar landsins stovnar, ið eru knýttir at Búskaparskipan landsins. Endamálið við tí er at fáa eina munadygga almenna fyrisiting. Skal gjaldstovan seta mál fyri hægsta stigið í uppgávustigveldisskipanini, skuldu mál verið sett fyri "munadyggari almennari fyrisiting". Men hetta hevur Gjaldstovan ikki gjørt, og orsakirnar eru fleiri.

Í fyrsta lagi er tað trupult at skilmarka, hvat liggur í "munadyggari almennari fyrisiting". Tað kunnu vera rættiliga nógv viðurskifti, sum gera seg galdandi. Men eitt av teimum, og tað, sum ofta hevur áhuga, er, at landið sparir pening. Trupulleikin er í hesum føri at rokna, hvussu nógvan pening landið sparir við einum pappírsleysum roknskaparverki. Tað er eisini eitt valaverk at royna at rokna hetta út. Ætlanin við "pappírsleysa roknskaparverkinum" er ikki bara at spara beinleiðis pening, men eisini at tilfeingið hjá almennum stovnum er tøkt at loysa aðrar uppgávur. Tað er tengt at, hvussu nógv og hvussu stovnurin brúkar "pappírsleysa roknskaparverkið". Tað hevur gjaldstovan onga ávirkan á. Tá ið mál

[1] Hugtakið "uppgávur" verður í hesi vegleiðing brúkt sum savningarhugtak fyri virksemi, veitingar og úrdrátt.

verða sett, er umráðandi, at stovnurin, sum setur sær málini, eisini kann ávirka, at málini verða rokkin. Tað kann gjaldstovan ikki í hesum førinum, og tí verður ikki sett mál á "árinar" stiginum.

Í seinna lagi kann gjaldstovan ávirka, hvussu nógv pappírsleyst tilfar á roknskaparøkinum er tøkt. Tí verður sett sum mál á úrdráttarstiginum, at 95% av øllum roknskaparverkinum skulu vera pappírsleys innan 2007. Tað merkir, at almennir stovnar mugu fáa upplýsingar í KT-skipanum, ið fyrr vóru á pappíri, og tað má gjaldstovan geva teimum. Á hesum stigi verða tó ikki sett mál ella avrikskrøv, tí økið er ikki avgerandi í hesum sambandinum.

Á virksemisstigi eru fleiri verkætlanir, sum settar mugu verða í verk fyri at fortreytirnar eru at fáa "pappírsleysa roknskaparverkið". Nakað av virkseminum er gjørdt, og farið verður undir annað. Fyri at røkka málinum um "pappírsleysa roknskaparverkið", skal gjaldstovan seta sær nøkur avrikskrøv, sum stuðla upp undir málið. Dømi um avrikskrøv eru at fáa talgildar rokningar, gera útboðstilfar til NetMiðlu og seta í verk web-løn.

Ætlanin við hesum døminum er at vísa, at uppgávustigveldisskipanin kann verða brúkt til at greina uppgávurnar og á ein skipaðan hátt síggja, hvat málið er, hví júst hetta verður brúkt sum mál, og hvørji avrikini eru, ið stuðla upp undir málið.

## 2.3 Tilmæli til mál og avrikskrøv

Tá ið mál og avrikskrøv verða sett, eru ymisk viðurskifti, ið stjórnarráð og stovnar eiga at hava í huga. Niðanfyri eru sjey tilmæli, ið støða eigur at verða tikin til, áðrenn farið verður undir at gera avrikssáttmála.

1. Avrikssáttmálar eiga, alt tað ber til, at fata um allar høvuðsuppgávurnar hjá stovninum.
2. Mál- og avriksstýring eiga at vera festar í missiónina og visjónina hjá stovninum, soleiðis at samsvar er millum avrikssáttmálan og framtíðarætlanina.
3. Málini skulu helst verða sett eftir uppgávum, ið eru á úrdráttar- ella árinarstigunum. Málini skulu vanliga ikki vera fleiri enn fimm í tali.
4. Teir stovnar, ið hava nógv samskifti við borgarar, fyritøkur o.o., eiga alt tað ber til, at seta mál, sum eru vend móti brúkaranum.
5. Tað skal kunna verða mett, um málini eru rokkin ella ikki. Helst skal bera til at máta nøgdir, men mett kann eisini verða, um tað er álítandi.
6. Sum frá líður, eigur tað at bera til at býta kostnaðin á tænasturnar o.t., ið eru við í avrikssáttmálanum.
7. Er neyðugt hjá fleiri stovnum at samstarva fyri at røkka einum máli, eigur málið at vera við í avrikssáttmálunum hjá øllum teimum stovnum, sum tað fatar um. Gongur málið tvørtur um mørk hjá stjórnarráðunum, eiga tey at samskipa hetta arbeiðið.

Niðanfyri verða hesi tilmælini betur útgreinað.

### <u>2.3.1. Allar høvuðsuppgávurnar hjá stovnum skulu vera við</u>

Fyrsta tilmæli er, at málini samanløgd skulu, alt tað ber til, fata um allar høvuðsuppgávurnar hjá stovninum. Tá ið uppgávurnar skulu verða skipaðar, kann uppgávustigveldisskipanin omanfyri verða brúkt sum amboð.

Sjáldan ber til at hava allar uppgávur við í einum sáttmála. Avbjóðingin er at velja og raðfesta tær týdningarmestu uppgávurnar. Eru ov nógv mál og krøv til avrik við í avrikssáttmálanum, er vandi fyri, at stovnurin ikki savnar seg um tað, sum er týdningarmikið. Tí er tað umráðandi, at stovnurin raðfestir uppgávurnar rætt og tekur tær "røttu" við í avrikssáttmálanum.

Mál eru vanliga um viðurskifti, sum yvirskipað seta strategisku kósina hjá stovninum. Avrikskrøv eru harafturímót um meiri ítøkilig viðurskifti, sum stovnur skal avrika. Ofta skulu fleiri avrik til fyri at røkka einum máli. Áðrenn eitt mál er endaliga rokkið, kunnu ganga fleiri ár. Tilmælið, at málini samanløgd skulu fata um alt virksemi, er bara galdandi fyri strategisku málini og ikki fyri avrikskrøvini.

### 2.3.2. Strategiska legan

Annað tilmæli er, at mál og avrikskrøv skulu verða fest í missiónina og visjónina, soleiðis at samsvar er millum avrikssáttmálan og framtíðarætlanina fyri stovnin.

Harafturat verður mælt til, at mett verður um strategiska týdningin, sum hvørt einstakt mál hevur. Vanliga er tað so, at innan ávísa tíð hava summar uppgávur størri strategiskan týdning enn aðrar, men kortini skulu allar uppgávur verða røktar, sjálvt um tær ikki allar eru líka átrokandi. Til dømis kann ein stovnur hava eina tíðaravmarkaða uppgávu, ið tekur nógva orku og tíð at loysa, men sum neyðugt er at leggja dent á at fáa loyst, fyri at vaksa framleidni og munadyggsemi. Samstundis skal stovnurin røkja dagligu uppgávurnar t.d. vegleiða borgaran, viðgera sakir og seta í verk ymsar leiðbeiningar.

Boðskapurin er, at tað er umráðandi hjá stovninum at loysa allar uppgávurnar, men samstundis er tað, í einum ávísum tíðarskeiði, meiri týðandi at loysa summar uppgávur enn summar.

### 2.3.3. Høgt stig í uppgávustigveldisskipanini

Triðja tilmæli er, at tá ið málini verða sett, skulu tey helst verða sett eftir uppgávum, ið eru á úrdráttar- ella árinarstiginum í uppgávustigveldisskipanini, sí eisini omanfyri undir broti 2.2.

Endamálið at seta uppgávurnar í eina uppgávustigveldisskipan er at hjálpa at gera av, hvat er eitt mál, og hvat er eitt avrikskrav. Eisini skal uppgávustigveldisskipanin vera ein hjálp til at seta mál, ið eru framsøkin. Tað er sera umráðandi at skilja millum mál og avrik. Verður hetta ikki gjørt, kann lættliga bland koma í, um hvat er mál, og hvat er avrik. Úrslitið kann verða, at sáttmálin verður ein vavgreytur av, hvat er mál og hvat er avrik, og trupult kann verða at savna seg um týdningarmestu málini.

Málini skulu vanliga ikki vera fleiri enn fimm í tali. Tað verður so statt mælt til at seta nøkur fá mál, men tað kunnu við fyrimuni verða sett fleiri avrikskrøv til hvørt málið. Soleiðis ber eisini til at gera fleiri mátingar. Sum longu nevnt, eru vanliga fleiri avrikskrøv, sum samanløgd mugu verða rokkin fyri at røkka einum máli.

### 2.3.4 Uttanhýsis- og innanhýsis vend mál

Fjórða tilmæli er, at stovnar, alt tað ber til, seta mál, ið eru uttanhýsis vend. At mál eru uttanhýsis vend merkir, at avrikini, ið skulu verða rokkin, viðvíkja øðrum

enn stovninum. Tað kunnu vera borgarar, fyritøkur, brúkarar, kommunur og aðrir almennir stovnar.

At mál eru innanhýsis vend merkir, at málið viðvíkur innanhýsis viðurskiftum um, hvussu uppgávurnar verða loystar, t.d. hvussu arbeiðið verður lagt til rættis, hvussu starvsfólkatilfeingið verður brúkt, hvussu bygnaðurin er á stovninum, og hvussu starvsfólkamenningin er.

Uttanhýsis vend mál eru vanliga ovarlaga í uppgávustigveldisskipanini (árinar-, úrdráttar- og møguliga veitingarstiginum), men innanhýsis vend mál eru vanliga niðarlaga í uppgávustigveldisskipanini (virksemis-, tilfeingis- og fíggjarevnisstiginum).

Fyri flestu uppgávur er lætt at gera av, um tær eru uttanhýsis ella innanhýsis vendar. Tó bera summar uppgávur brá av, at tær eru bæði uttanhýsis og innanhýsis vendar. Serliga er tað galdandi fyri menningarátøk, ið viðvíkja brúkarum, ið eru ikki á stovninum. Sum dømi kunnu verða nevnd at talgilda eina viðgerð og sjálvavgreiðsla um alnótina.

Hvussu nógv málini skulu verða uttanhýsis ella innanhýsis vend, má sjálvsagt verða grundað á tær uppgávur, stovnurin skal loysa. Tað er mest natúrligt, at stovnar, ið hava nógv við borgaran o.o. at gera, eisini tillaga málini soleiðis, at tey verða uttanhýsis vend.

### 2.3.5. Mátingar

Fimta tilmæli er, at tað helst skal bera til at máta málini og avrikini við at máta nøgdir, t.d. tíð, eindir, ella um verkætlanin er liðug ella ikki. Tað merkir, at stovnar, ið hava avrikssáttmálar, skulu máta avrik, sum fyrr ikki eru mátað. Hetta ber í fleiri førum í sær, at stovnar mugu gera tillagingar í KT-skipanum og mannagongdum.

Tó má verða ásannað, at til ber ikki at máta øll mál og avrik í nøgdum. Tey kunnu kortini vera við í avrikssáttmálanum, men kravið er, at stovnurin kann sanna, hvussu hesi mál og avrik verða mett álítandi, og at tað stendur greitt í avrikssáttmálanum, hvussu metingin verður gjørd. Til dømis kann ein stovnur fara undir eina stóra KT-verkætlan, sum varir fleiri ár. Tá ber til at seta varðar á vegnum og greiða frá, hvussu metingin, við hvønn varðan, verður gjørd.

Ein annar spurningur í hesum sambandi er, hvussu ofta ein stovnur skal geva stjórnarráði frágreiðingar um rokkin mál og avrik. Í flestum førum er tað hóskandi at greiða frá tvær ferðir árliga. Eina støðufrágreiðing eftir fyrra hálvár og eina meiri gjølliga frágreiðing eftir árslok.

### 2.3.6. Kostnaðarbýti

Sætta tilmæli er, at sum frá líður, skal bera til at býta kostnaðin á úrdráttirnar, veitingarnar o.t., ið stovnurin skal veita. Tilmælið merkir, at fíggjarstýringin í framtíðini er so mikið liðilig, at til ber at býta kostnaðin á avrikini. Hetta kann t.d. verða gjørt við at broyta útreiðslugrundaðu skrásetingarnar, sum nú eru, til kostnaðargrundaðar skrásetingar. Mælt verður til, at í fyrstu atløgu verður tað gjørt fyri stovnar, har kostnaðargrundaða skrásetingin hevur mestan strategiskan týdning, og sum fáa mest gagn av hesi umlegging.

Kostnaðarbýti:

Kostnaðarbýtið merkir, at stovnur skal býta allan kostnaðin á virksemi, veitingar og úrdráttir.

Kostnaðarbýtið hevur serliga týdning fyri stovnar, ið hava framleiðslu, sum gevur inntøku ella inntøkur frá øðrum virksemi, og sum skulu vita, hvussu stórur partur av útreiðslunum stava frá at gera úrdráttirnar, sum geva inntøku.

Flestu stovnar hava, sum er, ein kostnað, t.d. at brúka bygningar, at halda teir og starvsfólkakostnað, sum verður ikki býttur á virksemi ella veitingar. Ætlanin við kostnaðarbýtinum er, at felagskostnaður, eisini avskrivingar, skulu verða býtt á virksemi og veitingar, ið stovnurin framleiðir.

Endamálið við at býta bæði beinleiðis og óbeinleiðis kostnað er eisini at bøta um gjøgnumskygni, og við tí fáa til vega betri grundarlag til politiskar raðfestingar. Í øðrum lagi hevur kostnaðarbýtið við sær betri grundarlag til innanhýsis fíggjarstýring á stovnum. Kostnaðarbýtið ger tað sjónligari, hvat tilfeingið verður brúkt til. Stjórar fara so statt at hava betri fortreytir at meta um, um tilfeingið verður brúkt á ein framleidnan og munadyggan hátt.

### 2.3.7. Samstarv millum stovnar

Sjeynda tilmæli er, at stovnar samstarva, er tað skilagott fyri at loysa uppgávuna munadygt. Uppgávustigveldisskipanin kann vera eitt amboð til tess. Hugt eigur at verða at, hvørjar uppgávur skulu verða loystar, heldur enn hvør stovnur skal loysa uppgávurnar.

Gongur málið tvørtur um mørk millum stjórnarráð, hava tey serliga góðar fyritreytir at síggja, um til ber, at stovnar samstarva um tey. Stjórnarráðini eru sum meginregla partar í øllum avrikssáttmálum, og hava tí møguleika at gera neyðuga yvirlitið yvir, hvørjar uppgávur best verða loystar í samstarvi.

Verða sett felags mál stovnanna millum, eiga málini sjálvsagt at vera við í avrikssáttmálum hjá teimum stovnum, sum tey fata um.

## 2.4 Tilgongd til avrikssáttmála

Hesin parturin snýr seg um, hvussu arbeiðið við avrikssáttmálum kann verða lagt til rættis. Endamálið er at geva íblástur til, hvussu stjórnarráð og stovnar í verki kunnu gera avrikssáttmála.

Mælt verður til, at stovnar fara soleiðis til verka:

- Orða yvirskipaða missión, visjón og gera eina strategiska ætlan
- Flokka uppgávurnar í uppgávustigveldisskipan
- Orða mál og avrikskrøv
- Máta regluliga

Í nøkrum førum er tað neyðugt at arbeiða stigvíst, at røkka málunum, ið eru viðgjørd í hesari vegleiðingini.

Stigini fyri at seta í verk avriksstýring verða ymisk frá stovni til stovn. Kassarnir niðanfyri eru tí bara ætlaðir sum dømi um tilgongdina til avrikssáttmála.



Fyrst er ein innleiðandi tilgongd, har stovnurin í fyrsta stigi orðar eina yvirskipaða missión, visjón og ger eina strategiska ætlan. Uppgávurnar eiga eisini at verða flokkaðar í uppgávustigveldisskipanini. Hvat verður gjørt fyrst, hevur ikki so nógv at siga. Verður hildið, at uppgávustigveldisskipanin lættir um at gera missión, visjón og strategi fyri stovnin, er at gera tað fyrst. Mest umráðandi er, at samsvar er millum missión, visjón, strategi og uppgávustigveldisskipan.

Annað stigið er at seta mál samsvarandi uppgávustigveldisskipanini. Helst skal tað verða gjørt viðvíkjandi uppgávum á úrdráttarstiginum, sum eru framsøknar. Eftir hetta kunnu avrikskrøvini, ið stuðla málinum, verða sett upp, og samstundis má greiði verða fingin á, hvussu avrikini verða mátað, ella hvussu metingar skulu verða gjørdar. Eisini skal tíðarætlan verða gjørd fyri, nær avrikini skulu verða avrikað.

Triðja stigið er eftir tað, at sáttmálin er gjørdur við stjórnarráðið. Sjálvsagt er ein partur av stýringini at máta avrikini regluliga og annars at gera frágreiðingar til stjórnarráðið, soleiðis sum tað er avtalað í sáttmálanum.

Niðanfyri er ein onnur útgreining, hvussu farið kann verða fram stig fyri stig.

| | Stig 1 | Stig 2 | Stig 3 |
|---|---|---|---|
| Orða missión, visjón og gera strategiska ætlan | Seta í verk tilgongd | Fyrsta orðing viðvíkjandi missión, visjón og strategi | Dagføra missión, visjón og strategiina samsvarandi uppgávu-stigveldisskipanini |
| Uppgávustigveldisskipan | Fáa yvirlit yvir allar uppgávurnar og flokka tær | Fyrsta flokking viðvíkjandi teimum týdningarmestu uppgávunum | Býta allar uppgávurnar endaliga |
| Seta mál og avrikskrøv | Gera eina ætlan fyri mál og avrikskrøv fyri uppgávurnar | Orða fá mál og avrikskrøv fyri úrvaldar úrdráttir (t.d. framleidni og dygd) | Áseta fleiri mál og avrikskrøv fyri øll produktini (framleidni, munadyggsemi, dygd) |
| Máta | Yvirlit yvir hvørji dáta, sum skulu verða brúkt til mátingar, eru atkomulig og hvørji ikki eru | Gera fáar mátingar viðvíkjandi teimum týdningarmestu tænastunum | Regluliga máta allar tænastur |

Birt verður upp undir, at arbeiðið við avrikssáttmálum kann fara fram í stigum. Í fyrsta avrikssáttmálanum mugu í minsta lagi stig 1 og 2 verða avgreidd.

Tað er týdningarmikið at fara undir arbeiðið, heldur enn at royna at gera ein fullfíggjaðan avrikssáttmála fyrstu ferð. Verður roynt at fáa allar úrdráttir, veitingar og virksemi við fyrstu ferð, er tað fyri fleiri stovnar ein ovurhondsstór uppgáva, ið krevur alt ov nógva orku og tíð. Tí verður heldur mælt til at byrja á einum hóskandi stigi, og so heldur byggja meiri á avrikssáttmálarnar, sum frá líður, og so hvørt sum stovnurin fær fleiri royndir við avrikssáttmálum.

Alt eftir hvør stovnurin er, og hvussu nógvar úrdráttir o.t. hann hevur, kann verða roknað við, at tað varir 2-3 ár, áðrenn stig 3 virkar til fulnar.

Fylgiskjal 1 er uppskot um form fyri avrikssáttmála.

# 3. Vegleiðing til stjórasáttmála

Stjórasáttmáli er skrivlig avtala, sum verður gjørd millum stjórnarráð og stjóran á stovni. Stjórasáttmálin er fylgiskjal til avrikssáttmálan. Sambært § 5, stk. 4 í roknskaparkunngerðini skulu stjórasáttmálar verða lagdir fyri Fíggjarmálaráðið at góðkenna.

Høvuðsendamálið við stjórasáttmála er, at halda stjórum til at røkka mál og avrikskrøv, ið sett eru í avrikssáttmálanum. Stjórasáttmálar eiga at verða gjørdir eftir tað, at avrikssáttmálin er gjørdur, tí øll mál og avrikskrøv, sum eru í avrikssáttmálanum, skulu eisini vera í stjórasáttmálanum.

Treytirnar fyri avrikslønini eiga at vera greiðar í stjórasáttmálanum. Í sáttmálanum skulu t.d. standa upplýsingar um sáttmálatíðina, hægsta mark fyri avriksløn, mál/avrik skulu verða ásett, og hvussu tey skulu verða mátað, ella hvussu mett verður um tey, umframt hvussu tey verða vigað.

Broytast fortreytirnar munandi, og hevur stjórin ikki ávirkan á fortreytirnar, kann í sáttmálanum standa, at samráðst kann verða um hann av nýggjum. Somuleiðis eigur at standa, hvussu farið verður fram, fer stjórin úr starvi í sáttmálatíðini.

Tá ið stjórasáttmálar verða gjørdir, skal verða avtalað, hvør avrikslønin kann verða í prosentum. Hægsta avrikslønin er sett til 25% av lønini, lønaráskoyti roknað uppí, men hon kann eisini vera lægri. Avrikslønin má verða sett eftir framsøkninum í avrikssáttmálanum. Fyri at fáa útgoldið hægst avtalaða prosentið í avriksløn, skal stovnurin røkka málunum 100%. Eru tey ikki rokkin 100%, fær stjórin part av avrikslønini útgoldna. Er t.d. avtalað, at stjórin kann fáa 15% ískoyti, og stovnurin hevur rokkið málini og avrikini 50%, fær stjórin 7,5% í lønaráskoyti.

Fyri at kunna rokna avrikslønina hjá stjóranum, skulu málini kunna verða vigað eftir, um tey eru rokkin ella ikki.

Til hvørt mál eigur at verða ásett, hvussu nógv málið skal verða vigað. At máta ella meta um, um málið er rokkið, er grundarlagið undir at rokna avrikslønina. Er t.d. eitt mál vigað 10%, og málið er rokkið 90%, kann málið telja 9% í útrokningini av allari avrikslønini.

Mál kunnu eisini verða sett upp soleiðis, at annaðhvørt eru tey rokkin, ella eru tey ikki rokkin, t.e. annaðhvørt 0% ella 100%.

Eisini ber til at seta talstrekki fyri, hvussu málini eru rokkin, t.d. 0%, 25%, 50%, 75% ella 100%.

Hvussu stór avrikslønin er, ásetir aðalstjórin í stjórnarráðnum eftir samrøður við stjóran á stovninum. Hvussu nógv tey einstøku málini og avrikini skulu viga, og hvussu tey verða gjørd upp, má aðalstjórin subjektivt gera av. Í metingini eigur dentur at verða lagdur á tann strategiska týdningin, ið málini og avrikskrøvini hava. Tað má vera eitt skilagott samsvar millum framsøknið í avrikssáttmálanum, hvussu málini viga og hvussu stór avrikslønin er.

Tá ið sáttmálaskeiðið er runnið, verður gjørt upp, hvussu hilnast hevur við settum málum og avrikskrøvum.

Fyrst verður hvørt avrikskrav gjørt upp ella mett. Seinra stigið er at gera eina avriksmeting samanborið við vigingina, ið er avtalað í stjórasáttmálanum, fyri at koma til talvirðið viðvíkjandi avrikinum.

Avriksløn til stjórar verður latin árliga. Eftirløn verður ikki goldin av avrikslønini. Avriksløn er eitt ískoyti til lønina hjá stjóranum og broytir ikki setanarviðurskiftini annars.

Fylgiskjal 2 er uppskot um form til stjórasáttmála.

# 4. Gera avriks- og stjórasáttmála

Niðanfyri er eitt uppskot um tíðarætlan og framferðarhátt at gera avriks- og stjórasáttmála.

| Kanna uppgávur og orða missión, visjón og strategi | Uppskot til avrikssáttmála | Sáttmála-samráðingar | Stjórasáttmáli og møguliga tillagingar í avrikssáttmála |
|---|---|---|---|
| **September** | **Oktober** | **November** | **Desember** |
| • Stovnur og stjórnarráð velja fólk, ið skulu verða við í arbeiðinum at gera avrikssáttmála<br>• Stovnur ger yvirlit yvir uppgávurnar, ið hann ger nú, og tær, sum skulu verða gjørdar<br>• Stovnur ger uppskot til missón, visjón og strategi<br>• Stovnur ger uppgávustigveldis-skipanina<br>• Stovnur sendir tilfarið til stjórnarráð | • Stjórnarráð viðger missiónina, visiónina, strategiina og uppgávustigveldis-skipanina saman við stovninum<br>• Stjórnarráð vísir á, hvat tað væntar, at stovurin fremur næsta árið og næstu árini. Kemur møguliga við uppskoti, hvørji mál skulu verða sett<br>• Stovnurin ger uppskot til avrikssáttmála og sendir tað til stjórnarráð | • Stjórnarráð viðger uppskotið til avriks-sáttmála<br>• Stjórnarráð og stovnur samráðast um avrikssáttmálan<br>• Stovnur tillaðar møguliga avrikssáttmálan<br>• Aðalstjóri og stovnsleiðari undirskriva avrikssáttmálan | • Stjórnarráð ger uppskot til stjórasáttmála og vigar málini í sáttmálanum<br>• Aðalstjóri og stovnsleiðari undirskriva stjórasáttmálan<br>• Sáttmálin verður sendur Fíggjarmálaráðnum at góðkenna<br>• Tillagingar verða møguliga gjørdar í avrikssáttmálanum samsvarandi fíggjarlógini<br>• Avrikssáttmálin og stjórasáttmálin verða alment atkomuligir á heimasíðuni hjá stjórnarráðnum og stovninum |

Byrjanarstigið fyri tíðarætlanina er, at fyrireikingar, samráðingar og semja um avrikssáttmála verða gjørd í so mikið góðari tíð, at til ber hjá stovninum, saman við øðrum uppgávum hjá stovninum, at ráðleggja um mál og avrikskrøv í sáttmálanum, áðrenn sáttmálin kemur í gildi.

Verður avrikssáttmálin undirskrivaður eftir leistinum omanfyri, er tað sjálvsagt ávís óvissa um, hvussu játtanin til stovnin verður samanborið við fíggjarlógaruppskotið. Eru stór frávik í fíggjarlógini, samanborið við hvat væntast kundi í samráðinginunum, og ávirkar tað avrikssáttmálan, er sjálvsagt neyðugt at tillaga avrikssáttmálan.

Avrikssáttmálar skulu helst ikki vera ov langir. Vegleiðandi eiga teir ikki at vera longri enn tíggju síður.

Fylgiskjal 1 og 2 eru um avrikssáttmálar og stjórasáttmálar.

Tað, sum stendur í klombrum [.] í fylgiskjølunum, skal stovnurin sum minstakrav fylla út. Tað sum stendur í skákskrift, er vegleiðandi fyri tí, sum skal standa í ymsu teigunum og eigur at verða strikað úr avrikssáttmálanum.

# Fylgiskjal 1: Formur til avrikssáttmála

## 1. Inngangur

Hesin avrikssáttmáli er millum [stjórnarráð] og [stovn]. Í sáttmálanum er dentur lagdur á uttanhýsis vend mál.

[Lýs stovnin í stuttum]

Í talvuna niðanfyri verður greitt í stuttum frá missiónini, visjónini og strategisku fokusøkjunum. Í niðaru talvuni verða úrdráttirnir raðfestir, og tey mál, ið eru sett samsvarandi teimum. Endamálið er at gera greitt, hvussu mál og avrikskrøv hava sín uppruna í missiónini og visjónini, umframt hvussu málini eru knýtt at uppgávustigveldisskipanini (úrdráttunum).
Avrikssáttmálin skal fata um tey strategisku fokusøkini, sum stuðla uppundir framtíðar menningina. Tey strategisku fokusøkini skulu síggjast aftur í málunum og avrikskrøvunum fyri teir úrdráttir, ið eru týdningarmikil fyri stovnin.

Yvirlit yvir missión, visjón og strategisk fokusøkir

| | |
|---|---|
| Missión: | [Orða missiónina] |
| Visjón: | [Orða visjónina] |
| Strategiskt fokusøki 1 | [Orða strategisk fokusøki] |
| Strategiskt fokusøki 2 | [Orða strategisk fokusøki] |
| Strategiskt fokusøki n | [Orða strategisk fokusøki] |

Fyri at fáa eitt heildaryvirlit yvir stovnsins úrdráttir og tey mál, ið eru sett samsvarandi úrdráttunum, verður talvan niðanfyri gjørd.

Yvirlit yvir úrdráttir, strategisk fokusøkir og mál

| | Strategiskt fokusøki 1 | Strategiskt fokusøki 2 | Strategiskt fokusøki n |
|---|---|---|---|
| Úrdráttur 1 | [Set mál] | [Set mál] | [Set mál] |
| Úrdráttur 2 | [Set mál] | [Set mál] | [Set mál] |
| Úrdráttur n | [Set mál] | [Set mál] | [Set mál] |

## 2. Mál og avrikskrøv

Niðanfyri eru sett mál og avrikskrøv fyri úrdráttirnar hjá [stovnur].

Úrdráttur [nr.]: [Set yvirskrift]

Mál [nr.]: [Set yvirskrift]
[Málið lýst í stuttum]

> Fyri hvønn úrdrátt verða sett mál og avrikskrøv. Sum minsta mark verður sett eitt mál fyri hvønn úrdrátt. Í innganginum kann málið verða lýst í stuttum.
> Fyri hvørt mál verður gjørd ein talva, har avrikskrøvini fyri málið verða sett. Tað kunnu vera fleiri avrikskrøv fyri hvønn flokkin, t.e. ávirkan, virksemi, framleidni og dygd.

Avrikskrøv fyri mál [nr.]

| Avrikskrav | | Tíðarfreist |
|---|---|---|
| Ávirkan | [Frágreiðing um avrikskrav] | [Set tíðarfreist] |
| Virksemi | [Frágreiðing um avrikskrav] | [Set tíðarfreist] |
| Framleidni | [Frágreiðing um avrikskrav] | [Set tíðarfreist] |
| Dygd | [Frágreiðing um avrikskrav] | [Set tíðarfreist] |

> Avrikskrøvini eru fyri at seta í verk málini, og sett verður, hvørji avrik stovnurin skal avrika fyri at røkka settum málum. Avrikskrøvini mugu verða orðað soleiðis, at tað ber til at meta um, um tey eru rokkin ella ikki. Metingin er annaðhvørt kvantitativ ella kvalitativ. Avrikskrøv kunnu verða orðað fyri øll fýra: Ávirkan, virksemi, framleidni og dygd. Tað er tó ikki krav, at avrikskrøv skulu verða orðað fyri øll fýra.

- Ávirkan kann t.d. vera kunnleiki um eitt átak, hvussu útbreiddir úrdráttirnir eru, effektiva fíggjarstýring hjá tí almenna o.t.
- Virksemi kann vera hvat virksemi skal til fyri at røkka málinum t.d. hvussu nógv mál eru viðgjørd, hvussu nógvar verkætlanir eru framdar og ráðgevarakanning.
- Framleidni er tilfeingisnýtsla fyri hvørja eind, ið er framleidd, t.d. málsviðgerartíð ella hvussu nógv mál. Kann t.d. eisini vera krav um, at lækka útreiðslurnar til eina ávísa veiting ella virksemi.
- Dygd lýsir stigið á framleiðsluni. Tað kann t.d. vera svarfreistir, hvussu nógv klagumálini eru og brúkaranøgdsemi.

3. Kostnaður

Býti á kostnaðinum á stovninum

| | Rakstur | Løn | Útreiðslur til samans | Inntøkur (-fortekn) | Netto-útreiðslur |
|---|---|---|---|---|---|
| Úrdráttur 1 | | | | | |
| Úrdráttur 2 | | | | | |
| Úrdráttur n | | | | | |
| Annað | | | | | |
| Útreiðslur til samans | | | | | |
| Játtan | | | | | |
| Úrslit | | | | | |

Talvan vísir, hvussu stovnurin væntar, at rakstur og lønir verða, býtt á einstøku úrdráttirnar og inntøkur av teimum. Kostnaðar- og inntøkubýti eru ikki bindandi fyri stovnin, tí stovnurin hevur ræðisrættin at leggja til rættis virksemi sítt innanfyri fíggjarkarmin á fíggjarlógini. Harafturímóti vísir talvan, hvussu nógv avrikssáttmálar fata um av fíggjarlógini.

4. Sáttmálaskeiðið og frágreiðingar

Sáttmálin kemur í gildi 1. januar [ár] og er galdandi í eitt ár.

Frágreiðingar verða gjørdar tvær ferðir árliga til stjórnarráðið. Ein frágreiðing verður gjørd fyri fyrra hálvárið og ein fyri alt árið (ársfrágreiðingin).

Í metingini um [stovnur] røkkur sett mál og avrikskrøv, verður dentur lagdur á, at tey eru rokkin innan fyri fíggjarligu karmarnar og til ásettu tíðina.

Verða fortreytirnar munandi broyttar, eftir tað at hesin sáttmálin er undirskrivaður, kann samráðast um hann av nýggjum, ella hann verður tillagaður, eru partarnir samdir um tað.

[staður], tann [dagur, mánaður og ár]

Fyri [stjórnarráð]

___________________
[aðalstjóri]

Fyri [stovnur]

___________________
[stjóri]

# Fylgiskjal 2: Formur til stjórasáttmála

## 1. Inngangur

Í hesum sáttmálanum eru sett [XX] mál fyri stjóran á [stovnur] fyri [ár]. Fyri hvørt mál eru sett avrikskrøv, ið verða vigað at rokna avrikslønina eftir.

Í talvuni niðanfyri eru sett tey mál, ið verða vigað í hesum sáttmála.

> Fyri at geva eitt heildaryvirlit yvir tey mál, ið stjóri á stovni eftir ætlan skal røkka, verður í talvuni niðanfyri sett, hvørji mál verða vigað í stjórasáttmálanum.

Mál í stjórasáttmálanum

| |
|---|
| Uttanhýsis vend mál: |
| Mál 1: |
| Mál 2: |
| Mál 3: |
| Innanhýsis vend mál: |
| Mál 4: |
| Mál n: |

## 2. Mál og avrikskrøv

Niðanfyri verða tey einstøku málini og avrikskrøvini viðgjørd:

Mál 1: [Yvirskrift til málið]
[Málið lýst í stuttum]

> Fyri hvørt mál verður gjørd ein talva, sum vísir mál og avrikskrøvini.
> Í talvuni verður ásett, hvussu nógv hvørt avrikskrav verður vigað. Fyri hvørt mál verður vektin samanløgd ásett, sum er hvussu nógv avrikskrøvini samantalt vigað. Vektin verður sett sum prosent. Tilsamans skulu øll málini geva 100 prosent.

| Mál 1: [Yvirskrift til málið] | Málið vigað: [%-parturin, sum málið vigar, samanborið við, hvussu nógv málini viga til samans] |
|---|---|
| [Lýs í stuttum avrikskrav 1] | [Vekt í %] |
| [Lýs í stuttum avrikskrav 2] | [Vekt í %] |
| [Lýs í stuttum avrikskrav n] | [Vekt í %] |

Mál n: [Yvirskrift av málinum]
[Málið lýst í stuttum]

| Mál n: [Yvirskrift til málið] | Vektin av málinum: [%-parturin, sum málið vigar, samanborið við, tað øll málini viga tilsamans] |
|---|---|
| [Lýs í stuttum avrikskrav 1] | [Vekt í %] |
| [Lýs í stuttum avrikskrav n] | [Vekt í %] |

3. Meta um, um málini eru rokkin

At meta um, um málini í sáttmálanum eru rokkin, verður gjørt eftir einari heildarmeting av avrikum, ið rokkin eru eftir avtalaðu vektini, ið er sett í hesum sáttmála.

Fyri at geva eitt heildaryvirlit yvir, hvussu málini verða vigað, verður talvan niðanfyri fylt út. Talvan gevur bæði stjóranum og stjórnarráðnum gott yvirlit yvir, hvussu tey ymsu málini verða vigað. Somuleiðis kann yvirlitið eisini tryggjað, at málini eru skilaliga vigað.

Viga málini

| Mál | Vekt |
|---|---:|
| Mál 1: | [Vekt í %] |
| Mál 2: | [Vekt í %] |
| Mál 3: | [Vekt í %] |
| Mál 4: | [Vekt í %] |
| Mál n: | [Vekt í %] |
| Tilsamans | 100 % |

Verður hildið, at málini eru rokkin 100%, verður avrikslønin roknað sum [XX]% av stjóralønini, lønarískoyti roknað uppí. Eru málini partvíst rokkin, verður avrikslønin lækkað samsvarandi. Avrikslønin verður útgoldin í einum.

Innan 30. apríl [ár] ger [stovnur] upp, hvussu væl málini eru rokkin.

4. Úr starvi og nýggjar samráðingar

Er stjóraskifti í sáttmálaskeiðnum, kann verða samráðst av nýggjum um sáttmálan. Verður tað ikki gjørt, eru málini framvegis galdandi.

Fer stjórin úr starvi í sáttmálaskeiðnum, fær hann lutfalsligan part av avrikslønini, alt eftir tíðini, hann hevur verið í starvinum og hvussu nógv hann hevur rokkið. Avrikslønin verður goldin, tá ið sáttmálaskeiðið er runnið, og eftir tað at rokkin mál eru gjørd upp.

Eru munandi broytingar í fortreytunum, eftir tað at hesin sáttmálin er undirskrivaður, t.d. í teimum førum, at hildið verður, at tað verður munandi verri at røkka sett mál av viðurskiftum, ið stjórin ikki kann ávirka, kann verða

samráðst av nýggjum um sáttmálan, ella hann kann verða tillagaður. Treytin er, at partarnir eru samdir um tað.

[staður], tann [dagur, mánaður og ár]

| | |
|---|---|
| Fyri [stjórnarráð] | Fyri [stovnur] |
| __________________ | __________________ |
| [aðalstjóri] | [stjóri] |